# Elli er ikki tað sama sum sjúka

**Tá 91 ára gamla, Elsa Høgnesen í Klaksvík, fyri einum ári síðani broytti lívsførðslu, byrjaðu plágurnar, sum hon í mong ár hevði drigist við, so smátt at hvørva. Dóttir hennara fekk hana at royna náttúruheilivág og kostætlan eftir tilráðing frá einum heilsuráðgeva**

LÍV OG HEILSA
*Rúna Sivertsen*



*Elsa í hugnaliga køkinum í heimi sínum í Klaksvík. Til høgru á myndini sæst fruktpressan, sum hon hvønn morgun nýtir til fruktsevjunar, hon skal drekka. Elsa er sloppin undan giktini og nógvum øðrum plágum, sum fylgja við aldrinum, bert við at broyta kostin og við at taka náttúruheilivág. - Tað er stríðið og peningin vert, tí nú havi eg tað sum fiskurin, sigur hon*

*(Mynd: Rúna Siverten)*

- Hvør dagur er mær ein gleði, tí eg havi nakað at síggja fram til. Eg eri vorðin varug við nakað sera týdningarmikið, og tað er, at elli ikki er tað sama sum sjúka. Hóast eg eri vorðin so gomul, so kann eg gleðast kortini, sigur Elsa.

Flestu klakvíkingar kenna Elsu hjá Erlingi, sum hon oftast verður rópt.

Eisini man hon vera kend uttan fyri Klaksvíkina av øllum teimum mongu, sum gjøgnum árini hava samskift við Norðoya Blikksmiðju.

Elsa er født og uppvaksin í Keypmannahavn. Í 1938 giftist hon Erlingi Høgnesen úr Fuglafirði. Tey komu at kennast, meðan Erling stóð í læru í Keypmannhavn.

### Eins eldhugað og fyrr

Kendi handilsmaðurin og reiðarin, Kjølbro, ætlaði at lata blikksmiðju upp í Klaksvík og eina ferð, hann var í ørindum í Keypmannahavn, bað hann Erling reka smiðjuna fyri seg.

Soleiðis bar tað á, at hesi bæði ungu fólkini búsettu seg í Klaksvík.

Í 1965 lótu Elsa og Erling upp egna blikksmiðju í kjallaranum í heimi teirra í Kráargøtu. Tað er ikki ov nógv sagt, at Elsa var "primus motor" á blikksmiðjuni øll 20 árini, hon og maðurin høvdu fyritøkuna.

Elsa er ein serstakliga røsk og arbeiðssom kvinna, og hjá henni verður einki latið í hendurnar á tilvildini. Nú árini eru vorðin so mong, er hon eins eldhugað, sum hon var á yngru árum.

### Árini ikki einsamøll

Men hjá henni, sum hjá øllum øðrum, koma árini ikki einsamøll. Fyri 20 árum síðani byrjaði heilsan at bila. Blóðtrýstið gjørdist ov høgt, og hon varð noydd at taka heilivág.

Síðani fekk hon sopp í naglirnar á fótunum. Heilivágurin, hon fekk frá Læknanum, hjálpti ikki, og seinni breiddi soppurin eisini seg til hendurnar.

Eftir at Elsa varð vorðin einkja, gjørdist heilsan verri, og hon fekk bløðrubruna og gikt. Heldur ikki fyri hesar plágurnar hjálpti heilivágurnin, hon fekk frá læknanum. Læknin segði, at bløðrubrunin kundi ikki grøðast, men mátti haldast niðri við heilivági restina av lívi hennara.

Nú tók hon 10 tablettir um dagin, og heilsan bara versnaði.

Hon kundi bert ganga stuttar teinar, orsaka av pínu í beinunum. Pínan stóðst av, at æðrarnar í beinunum vóru typtar. Tað, sum vit vanliga kalla forkálking. Eisini gjørdist hon skjótt forpøst og orkaði illa at draga andan, skuldi hon gera eitthvørt arbeiði.

### Fekk eitt nýtt lív

Men fyri einum ári síðani hitti Elsa ein heilsuráðgeva, sum kannaði hana og gjørdi henni eina kostætlan.

Kostætlanin er neyv og fyri hvønn dag í vikuni. Hon skal eta nógva frukt og grønmeti, umframt rís og korn av ymiskum slagi. Eisini tekur hon náttúruheilivág og kosttilskot.

Tað er spennandi at hyggja inn í matarskápið hjá Elsu. Har stendur ein rúgva av íløtum við øllum møguligum spennandi grýnum, kornum, turkaðum fruktum og plantum.

- Tað er nógv roks av at gera matin til, og tað er ikki ókeypis. Men tað er bæði stríðið og peningin vert, tí eg eri frísk av øllum, sum eg plágaðist av frammanundan, sigur Elsa ovurfegin.

Nú, eitt ár eftir, at hon fyrstu ferð hitti kostráðgeva sín, tekur Elsa onga tablett frá lækna.

Elsa leggur aftrat, at hon, síðani hon var ein smágenta, hevur lagt lív sítt í Guds hond og biðið hann signað tað, sum hon etur.

Yvir 80 ára gamlar barnagentur:

# Stuttligari hjá abbanum enn í skúla

**Verkfallið ger, at flestu stovnarnir við børnum eru latnir aftur, sum ikki hava privata reingerðing. Men sjálvt um stovnarnir eru latnir aftur, so merkir hetta ikki, at ongin barnaansing er. Í gjár hittu vit Egil og Louis, sum vóru farnir ein túr við barnagentunum hjá sær, sum eru 80 og 82 ára gamlir**

VERKFALL
*Ingrid Bjarnastein*



*Egil, 9 ár og Louis, 3 ár vóru farnir ein túr við barnagentunum hjá sær í gjáramorgunin. Barnagenturnar eru tveir yvir 80 ára gamlir brøður, Kristoffur Joensen og abbi dreingirnar, Poul Arni Joensen. Hundurin var eisini sloppin við*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Verkfallið rakar á ein ella annan øll nú á døgum. Flestu foreldrini merkja tað við, at børnini ikki sleppa í skúla ella barnagarð, og tí verða tey noydd at finna onnur hjálpiamboð fram. Ommur og abbar, systkin og onnur gerast til barnaansarar, og foreldrini, sum ikki sjálv eru í verkfalli, sleppa til arbeiðis.

Í gjár hittu vit Egil og Louis, sum eru verkfalsraktir. Ikki tí. Teir eru bert níggju og trý ára gamlir, men Egil sleppur ikki í skúla og Louis sleppur ikki í barnagarð.

– Nú er verkfall, so Louis tímur ikki í barnagarð, sigur Egil, sum er eldri beiggin.

Teir eru farnir túr í Havnardali saman við abbanum Poul Arna Joensen, sum gongur á 83. vetri, og abbabeiggjanum Kristoffur Joensen, sum er 80 ára gamal. Hundurin skuldi vaska sær um føturnir, so teir eru farnir ein spaseritúr.

– Eg tími ikki í bagnagarð. Bagnagarðurin sitin..., sigur Louis, sum gongur og rennur við einum spælirevolvara.

Egil gongur í 2. flokki í Venjingarskúlanum, og Louis gongur í barnagarði á Norðasta Horni.

– Nei, eg eri ikki barnagenta. Eg fór bara at vitja bróður, og so fóru vit ein túr. Tað er hann, sum hevur ansað eftir teimum báðum, meðan verkfallið hevur verið, sigur Kristoffur Joensen.

Teir báðir smáu halda eisini, at tað er nógv stuttligari at vera hjá abbanum enn at vera í skúla og barnagarði, og tað letur til, at Louis ætlar sær ikki aftur í barnagarðin í bræði. So hann leggur helst ikki so nógv í, um verkfallið verður drúgt.

Nevnast kann til stuttleikar at enda, at Poul Arni, abbin, ikki er nakar ókendur maður í Føroyum. Hann hevur verið jólamaður í útvarpinum í 27 ár, so tað eru ivaleyst fleiri, sum kenna røddina á honum aftur.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



# Jógvan Telling – 10 ár eftir blóðtøppin

Í dag, 22. mai, eru 10 ár liðin síðan Jógvan Telling Joensen tónleikari í Havn fekk ein blóðtøpp, sum gjørdi at hann bleiv lutvíst lammaður og einki fekk gjørt. Hesi tíggju árini, sum eru liðin síðan tá, hava verið ein stór avbjóðing hjá Jógvani, og hann hevur brúkt nógva tíð og orku til upptrening av ymiskum slagi. Hann hevur m.a. fingið sær koyrikort, spælir ymisk ljóðføri, og lært seg at brúka teldu. Áðrenn hann bleiv sjúkur, hevði hann ikki koyrikort, nú koyrir hann við bæði bili og campingvogni. Jógvan er útbúgvin tónleikari við konservatoriið í Keypmannahavn. Í løtuni arbeiðir hann arbeiðir við eini fløguútgávu við ymiskum barnasangum.

Uttanfyri húsini hjá sær hevur Jógvan ein stein, har ein yrking hjá honum er málað uppá. Hann hevur eisini gjørt eitt lag til yrkingina.

### Mín seinasti steinur

*Tú ert ikki serliga reinur*
*Men góður nokk til mín*
*Til at vera mín seinasti*
*steinur*
*Til gamalt vatn og gott vín*

Fríggjakvøldið 23. mai hátíðarheldur Jógvan 10 ára dagin við at bjóða vinum og kenningum heim til sín. Jógvan sigur, at hann ætlar sær í føroysk klæðir fríggjakvøldið.

# Hanna Wilson í Hull 80 ár

**Ein heilsan til Johonnu, systur mína, á 80 ára føðingardegi hennara.**





Johanna Helga, vanliga nevnd Hanna, varð fødd í Havn tann 22. mai 1923. Faðir okkara, L.W. Apol, var frá Delfzijl í Hollandi. Móður okkara, Angelika Súsanna, vanliga nevnd Sanna, var dóttir Andrias í Norðadali. Vit vóru trý systkin, undirritaði, Hanna og Jákup, ið doyði í 1986.

Undir seinna heimsbardaga, 1939-45, búðu vit í Havn. Sum øllum kunnugt, vóru Føroyar hersettar av bretum í 1940. Í Havn møtti Hanna mr. Harry Wilson, sum tá var hermaður. Tað rann saman teirra millum og í 1948 giftust tey í Hollandi. Tey fóru til Bretlands at búgva. Tá fór Harry at gera sína arkitektútbúgving lidna, sum steðgaði, tá hann varð kallaður inn til hertænastu. Eina tíð búðu tey í Douglas á oynni Man, har Harry starvaðist sum arkitektur. Seinnu mongu árini hava Hanna og Harry búð í Hull, har hann fekk starv sum arkitektur hjá býarstýrinum, til hann fór frá vegna aldur. Í hjúnarlagnum fingu tey fýra børn, tveir synir og tvær døtur. Tann elsti teirra, Louis Wilson, sum býr í London, hevur fleiri ferðir verið í Føroyum og skilir væl føroyskt. Hann er kendur av nógvum føroyingum bæði í Bretlandi og í Føroyum. Serstakliga í sambandi við stóra átakið, ið var ímóti grindadrápi og føroyingum, fyri fáum árum síðan. Tá varð hann ein hollur stuðul at hjálpa føroyingum og tala teirra søk.

Góða Hanna, eg fari við hesum at ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum áttati árunum tann 22. mai.

Kærar heilsanir, bróður tín

**Eiko Apol**

# Bátastevnan Kjalarvatn í Vestmanna leygardagin

**Eins og í fjør verður bátastevnan Kjalaratn hildin í Vestmanna. Í ár verður stevnan leygardagin 24. mai. Ágóðin av stevnuni fer til eitt myndasavn hjá Undirhúsinum í Vestmanna og til ein nýggjan kappróðrarbát til VÍF**

BÁTASTEVNA

Hóast verkfall er, verður bátastevnan Kjalarvatn í Vestmanna leygardagin 24. mai. Stevnan er fyri bátar í øllum landinum. Longu fríggjakvøldið fara fleiri bátar út í Hest at liggja náttina yvir. Stevnan byrjar kl. 14.00, tá ein søluframsýning letur upp á fiskavirkinum Atlantis í Vestmanna, har ymiskir handlar sýna fram bátaútgerð og hava ymisk góð tilboð til báteigarar. Kl. 14.30 møtast bátarnir við Fútaklett og koma at bryggju í Vestmanna kl. 15.00, tá Frelsunarherurin spælir á havnaøkinum. Kl. 15.30 verður ókeypis suppa á Fiskavirkinum til øll bátafólkini. Sluppin Jóhanna kemur kemur helst við fimm grindabátum. Motorsúkkluframsýning verður á havnaøkinum.

Kl. 23.00 verður dansur, har Country Bólkurin úr Klaksvík spælir.

Stevnan var fyrstu ferð hildin í fjør, tá vóru umleið 800 fólk til dansin. Ágóðin av stevnuni fer til eitt myndasavn í Undirhúsinum í Vestmanna og til ein nýggjan kappróðrabát til VÍF. Tað eru Undirhúsið og VÍF-Kappróðraneystið ið skipa fyri stevnuni. Kontakttelefonir: 264539/221577/210496.



Í samband við dansin verður bussamband samskipað við Náttarbussin, ið fer úr Sørvági kl. 23.00 og vestur aftur kl. 04.30 og frá City í Havn kl. 10.30 og suður aftur kl. 03.30 og kl. 05.30.

**Dagurin**
**22. mai. Castus,**
deyður í umleið 250. Saman við øðrum brendur á báli í Kartago.